<ph_1> <ph_1>
<ph_1> <ph_1>
<ph_1> <ph_1>
2. hvønn mikudag 2. hvønn mikudag



VARPIÐ
20 síður heft, - so tað heldur alla vikuna
Skráir og ummælir
Hvønn fríggjadag
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá
TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network
Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel
Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2

**UNGMANNAFELAGIÐ KELDAN, SKÁLAVÍK**
Sandoyarstevnan verður á Keldu vikuskifti 18., 19. og 20. juli.
*Nevndin*

**TIL SØLU**
Radiatorur 30x75. Hurð b. 55 cm. Vask, Bilbarnastólur.
*Tlf. 443056 ella 213313*

**H-VINDEYGU TIL SØLU**
4 stk. nýggj H-vindeygu 128,8 x 118,8 cm. til sølu við loddrøttum sprossa. 2 stk. av vindeygunum hava loddrættan sprossa á vinstru síðu og 2 stk. vindeygu hava loddrættan sprossa á høgru síðu.
*Tlf. 456017 ella 216121*

**FRÁ FØROYA AKVARIUFELAG**
Loppumarknaður verður á gongugøtuni 3. mai. Um onkur hevur hug at lata nakrar lutir eru tit vælkomin at seta tykkum í samband við okkum á
*tlf. 213232 ella 504805*

**KØLIREOL**
br. 2.5 m. hædd 2 m. við leysum kompressara bíliga til sølu.
*Tlf. 315528*

**FRYSTIBOKS**
við glasloki bíliga til sølu.
*Tlf. 315528*

**SAMLAÐ AVHEINTINGARTILBOÐ**
Ein wc-kumma, eitt baðikar, eitt vask, ein brúsikabina. Liturin er karry myrkagulur.
*Tlf. 318914*

**BRENNIOVNIR TIL SØLU**
Ein stórur brenniovnur, 100x65x50, sum hitar upp til uml. 80 fermetrar, bíliga til sølu.
*Tlf. 319601*

**APEX FERÐASEÐIL**
Eigur onkur ein Apex ferðaseðil at selja mær eitt sindur bíligari.
*Ring 316371 ella 216371*

**NOKIA 3330**
við 7 coverum + eina tasku til sølu fyri 1400 kr.
*Tlf. 250908 Kári*

**HEY!**
Hava tit klæðir, bøkur, møblar ella onnur brúksting, ið tit vilja sleppa av við, vilja vit fegin avheinta tað. Í Vágum tlf. 255669 í Havn tlf. 267704
*02.b*

**TIL SØLU**
Ein góð elektrisk skrivimaskina til sølu Carrera II.
*Tlf. 252623*

**TIL SØLU**
Saðil 15" og boksl str. Full til sølu fyri 2.200,- Nýprísur 3.700,- Lítið brúkt.
*Tlf. 458020 ella 226383*

**ANTIKVITETER SÆLGES BILLIGT**
Grundet kommende flytning bl.a. afsyrede møbler, blik dåser, petroleumslamper, billeder, kikkerter. Rich's samlealbum og meget andet.
*Tlf. 319194 ella 257246*

**NOKIA 3210**
fartelefon við løðara 500,- kr.
*Tlf: 442181*

**MODELBÁTUR**
til sølu. Báturin er heimagjørdur. Ein elmotorur fylgir við. Prísin kunnu vit tosa um.
*Tlf. 251439*

**TIL SØLU**
Innhurð v/karmi, 0,77 x 2.10 m, til sølu fyri 500 kr.
*Tlf. 219994*

**YNSKIST**
Kølibox 12 V skal brúkast í bili, ynskist til keyps.
*Tlf. 219125*

**YNSKIST**
Er tað nakar, sum hevur ein Apex flogferðaseðil Keypmannahavn og aftur bíliga til sølu.
*Tlf. 312762 aftaná kl. 15*

**KIOSK INVENTAR**
bíliga til sølu: Hillar, stativ, frystiboks, kølidiskar.
*Tlf. 447579*

**NÝGGJ FARTELEFON**
Nokia 6100. Fartelefonin hevur ikki verið í brúk. Til sølu fyri 3100 kr.
*Tlf. 60679949*

**MYNDATÓL TIL SØLU**
1 1/2 ára gamal Minolta Dynax 500si kassi til sølu fyri 1800 kr. 1 ára gamalt Minolta 3500 xi blitz til sølu fyri 1500 kr. 1 ára gomul Tamron 28-300 mm. aspherisk linsa. til sølu fyri 5000 kr. Samlað til sølu fyri einans 7500 kr., nýprísur 13000 kr.
*Tlf. 260590*

i
Sosialurin
Internet
Sosialurin
www.sosialurin.fo
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
-tað loysir seg

SANSIR 355 355




P/f Fiskavirkið sóknast eftir tveimum framleiðsluatstøðingum og tveimum lærlingum.

**Framleiðsluatstøðingar**
Atstøðingarnir, ið vit sóknast eftir, skulu helst hava fiskivinnuútbúgving ella aðra miðnámsútbúgving.

Annar atstøðingurin skal stovna og skráseta framleiðslu, gera innanhýsis skrásetingar, og hava eftirlit við ráfiskamóttøku.

Hin atstøðingurin skal arbeiða við innanhýsis eftirliti, arbeiða við úrtøkuskráseting og gera royndir.

Báðir atstøðingarnir fara at starvast saman við formonnum og fólki í framleiðsluni. Dentur verður lagdur á leiðsluppgávur. Løn sambært avtalu.

**Lærlingar**
Nú ber til at útbúgva seg til fiskavirkara í Føroyum. Nýggja yrkisútbúgvingin tekur 3 ár. Á Fiskavirkinum eru tvey pláss til fólk, ið vilja hava hesa útbúgving.

**Umsóknir**
Umsóknir skulu vera sendar okkum áðrenn 11. apríl 2003.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Fyrispurnigar um størvini skulu stílast til Hartvig Joensen, virkisleiðara.

FISKAVIRKIÐ

Postrúm 29 · 510 Gøta · Tel 441002 · Fax 441766 · www.prg.fo

Toll- og Skattstova Føroya

Løgtingslóg nr. 148 frá 30. desember 1996 um stuðul til rentuútreiðslur av lánum (við seinni broytingum).

Víst verður til kunngerð nr. 30 frá 4. mars 2003 frá Fíggjarmálaráðnum um rentustuðul til persónar, sum hava rætt til endurgjald á annan hátt fyri rentuútreiðslur.

Heimasíða: www.tollskatt.fo

E-mail: tollskatt@tollskatt.fo

## Rentustuðul

Nýggjar reglur um rentustuðul eru komnar.

Nýggju reglurnar snúgva seg um persónar, ið hava rætt til endurgjald á annan hátt fyri rentuútreiðslur. Hesir persónar hava ikki samstundis rætt til rentustuðul eftir rentustuðulslógini.

Men um persónurin kann prógva, at hann hevur frásagt sær rættin til endurgjald á annan hátt fyri rentuútreiðslur, kann hann søkja um rentustuðul eins og onnur.

Tann persónur, sum kemur undir ásetingina í kunngerðini, skal á hvørjum ári vátta, at hann hevur frásagt sær rættin til endurgjald á annan hátt fyri rentútreiðslur, eitt nú við váttan frá Udligningskontoret for Dansk Søfart.

Hevur tú spurningar, kanst tú venda tær til økisskrivstovuna.

Argir, tann 31. mars 2003
Toll- og Skattstova Føroya

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo





*Í dag leggur Diana í Puntabyrgi frá sær sum formaður hjá Felagnum Javna*

# Diana – rødd teirra veikastu

**Í mong ár hevur Diana í Puntabyrgi myndað felagið Javna, har hon hevur verið formaður fýra skifti. - Styrkin kemur frá Harranum, og hann hevur verið vegleiðari mín í arbeiðnum, sigur Diana, nú hon leggur formansstarvið frá sær**

FÓLK Á LEIÐINI
*Rúna Sivertsen*

Diana í Puntabyrgi er fødd í 1941 á Selatrað, har hon eisini sleit sínar barnaskógvar.

Foreldur hennara, Anna Maria og Mathias Jacobsen, fingu 9 børn, og er Diana elst av systkjunum.

Í 1962 giftist hon við Finn í Puntabyrgi av Tvøroyri, og eiga tey børnini, Ann, Margee og Tórur.

Barnaárini vóru góð, men Diana mátti arbeiða fyri seg. Pápi hennara, sum var timburmaður, var nógv burtur, viðhvørt til skips og onkuntíð smíðaði hann avstaðis.

Mamma hennara var tí nógv einsamøll við stóra barnaflokkinum. Í einum húsi við so nógvum børnum, var nógv at gera, og Diana slapp ikki at liggja á lætu síðuni. Hon var bert ein lítil smágenta, tá hon varð send til neyta og í torv. Tá í tíðini vóru heldur eingir hentleikar, so arbeiðið var hart og strævið.

## Tænti í Sloans húsi

Tá Diana var 14 ára gomul, fór hon, eins og flestu gentur tá, út at tæna. Leiðin gekk til Havnar til Ellu Sloan, har hon skuldi vera arbeiðsgenta.

- Hjá Ellu var gott at vera, tí tey vóru so fitt, og eg lærdi at arbeiða har, sigur Diana.

Í Sloans húsi var stuttligt at vera, tí har kom altíð so nógv fólk. Húsið var altíð klárt at taka móti gestum, og ofta gisti onkur har eisini.

Árini, hon var í Havn gekk hon í handilsskúla og tók handilsskúlaprógv í 1961. Tað var eisini í Havn, hon kom at kenna Finn, sum hon giftist við í 1962.

## Niður at lesa

Tey fyrstu árini búðu tey á Skála. Tá arbeiddi hon eitt skifti á skrivstovuni á skipasmiðjuni hjá Kjølbro. Men tað gav ikki so nógv av peningi sum fiskaarbeiði. Hon tók tí tað strævnara arbeiðið í turkihúsinum framum, fyri at vinna meiri av peningi.

Diana og Finn ætlaðu sær niður at lesa, og tað ráddi um at savna sær pening, tí tá vóru ikki so góðar fíggjarligar sømdir hjá teimum, sum lósu niðri.

Í 1964 fóru tey so avstað, hon at læra til sjúkrahjálpara og hann at lesa til byggifrøðing.

Árini í Danmark vóru góð, og danska samfelagið tók væl móti teimum, serstakliga tá tað vísti seg, at tvey av børnum teirra bóru brek.

Av tí at føroyska samfelagið lítið og einki hevði at bjóða teimum menningartarnaðu, vóru tey verandi niðri og komu ikki heimaftur eftir lokna útbúgving. Men tá felagið, Javni, varð stovnað, broyttust umtøðurnar hjá teimum so við og við. Og tá Skúlin á Trøðni fór at undirvísa menningartarnaðum, hildu Diana og Finn av, at nú var tíð at flyta heimaftur.

## Entrepenørur

Gjøgum árini hevur Diana eisini fingist við annað virksemi enn tað, sum er innan øki teirra menningartarnaðu.

Í 1973 varð Føroya Sjúkrahjálparafelag stovnað, og var Diana fyrsti formaður hjá felagnum.

Í mong ár rak hon saman við manni sínum entrepenørfyritøkuna, P/f í Puntabyrgi, har hon hevði alt tað skrivliga um hendi.

- Tað var ein spennandi tíð, og vit høvdu nógv góð arbeiðsfólk, sigur Diana.

P/f í Puntabyrgi, við búmerkinum, Varin Vísir Vegin, bygdi m.a. Nonnuklostrið, sum er tað einasta av sínum slagi í Føroyum. Bygningurin, sum Sjóvinnubankin læt byggja við SMS og ítróttarhøllin í Runavík, eru millum tey verk, sum standa eftir felagið, tá tey góvust í 1985.

## Eigi at gevast nú

- Nú eri eg gomul, tíðirnar broyttar, og eg eri broytt. Nú er tíð hjá mær at gevast - og hjá teimum yngru at taka við, sigur Diana.

Diana sigur, at hon hevur havt eitt gott og spennandi lív. Tey menningartarnaðu hava fylt heim teirra. Nærmastu grannar eru tvey sambýli; tað hevur eisini ríkað heimi hjá Dianu og Finn.

- Okkara vinfólk eru av góðum orsøkum tey menningartarnaðu og teirra avvarðandi, sigur Diana.

- Tíðin, sum formaður í Javna, hevur verið serstakliga góð fyri meg. Tað hevur verið avbjóðandi og stuttligt, og eg eri komin at kenna nógv fólk, sum eg annars ikki hevði havt møguleikan at hitt, sigur hon.

Diana, sum er eitt arbeiðsgrev og ikki orkar at binda frið, er takksom fyri, at hon er signað við góðari heilsu. Nú fer hon at gera alt tað, sum stundir ikki hava verið til fyrr. Hon ætlar sær at hugna sær heima og at vitja fólk.

- Í øllum hevur Gud verið skjól okkara, og hann hevur hjálpt okkum í neyðini. Nú lati eg arbeiðið frá mær og fari út í urtagarðin at hjálpa Finn.

**Fakta**

Í dag leggur Diana í Puntabyrgi frá sær sum formaður í felagnum Javna. Hon hevur røkt hetta starv í tilsamans 11 ár, fyrst frá 1978-80, síðani 1984-89, frá 1992-96 og frá 2000-03. Í 1977 var hon næstformaður hjá felagnum.

Fyrsta blaðið hjá Javna kom út í 1973, og var Diana ábyrgdarblaðstjóri fram til 1976. Diana er 61 ára gomul.